


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Ein rúmsáttur arbeiðsmarknaður



Val X

KARL A. OLSEN
Sjálvstýrisflokkurin

Sjálvstýrisflokkurin stuðlar einum rúmsáttum arbeiðsmarknaði. Tað eigur at vera ein mannarættur at fáa nýtt sín arbeiðsførleika. Virðið í einum arbeiði er nógv størri enn lønin; arbeiðið gevur okkum lívsvirði og sjálvsálit, tí er tað sera umráðandi at geva øllum møguleika at nýta sína arbeiðsorku.

Sjálvstýrisflokkurin heldur, at øll, sum hava arbeiðsførleika, skulu hava møguleika at nýta henda førleika á arbeiðsmarknaðinum. Best hevði verið, um fólk við skerdum arbeiðsførleika fingu umstøður at arbeiða á vanliga arbeiðsmarknaðinum saman við fólki við fullum arbeiðsførleika. Í onkrum føri er forðingin einans fysisk, har kundi broytt innrætting og hjálpitól latið arbeiðsmarknaðin upp fyri teimum við avmarkaðum arbeiðsmøguleikum.

Fleiri vard størv skuldu verið á bæði privata og almenna arbeiðsmarknaðinum.

Vit eiga eisini at skapa ein alternativan arbeiðsmarknað fyri tey, sum ikki kunnu vera á vanliga arbeiðsmarknaðinum. Her kundu t.d. verið arbeiðstilboð á umhvørvisøkinum, innan náttúruvernd, fríðkan av almennum økjum og innan endurnýtslu.

Somuleiðis eiga fólkapensjónistar at fáa møguleika at nýta sína arbeiðsorku, teir kundu m.a. arbeitt sum hjálparfólk á trivnaðar- og mentanarøkinum – t.d. hava bygdarsøvn og onnur søvn avgjørt tørv á arbeiðsorku.

Veljið Sjálvstýrisflokkin og Karl A. Olsen, tí vit vilja skapa ein rúmsáttan arbeiðsmarknað.

**X við lista D**

# Teir fara ikki á flog



Val X

TÓRBJØRN JACOBSEN
(týðing)

Tey spyrja íðin, hvør týdningarmesta mentanarliga og samfelagsliga hendingin var í árinum, sum nú er farið aftur um bak. Hví skuldu hesar báðar hendingar ikki verið tvær alin av sama vadmali? Eru mentan og samfelag ikki tveir samrunnir partar, ja, ósundurloysandi hugtøk, á sama hátt sum list og samfelag liggja í ævigum skilnaði?

Fyri mær var ársins mest umráðandi mentanarliga og harvið eisini samfelagsliga hending ein vitjan, sum endurtekur seg ár undan ári, hjá vinkonu míni, eini snjóuglu í djóragarðinum í grannalagnum.

Nú spyrja tit helst, hvør megin er, sum flytur meg yvir at hovi hennara – hon er ikki altíð líka fryntlig og gestablíð, og alt eftir hvussu reykurin stendur, verður tikið ímóti og sáldað frá – tað sum tó vinnur á mær, og sum fær meg at vitja hana, er vakurleikin, nossligheitin, villskapurin og hygnið hennara. Djørv er hon eisini, hóast hon ikki fær brúkt hendan eginleikan undir núverandi viðurskiftum. Tað, ið onkur hevur roknað til at vera hennara hungursmark, verður flýggjað henni inn um rimarnar.

Hvat vit práta um?

Tja, hvat kunnu rithøvundar tosa við snjóuglur um? Sjálvandi um hitt ótømiliga evnið: Snið og innihald. Í ár var samrøðuevnið okkara - frælsisins snið og innihald.

Eg spurdi snjóugluna, um henni hevði staðið í boði at sleppa úr búrinum - út í stikaða økið, har tað hóast alt var høgt og frítt til loftið, har úti sum pelikanarnir og kondorarnir gingu. Svarið var játtandi, men hon hevði ikki lagt í, og hevði havnað tilboðnum, tí hon treivst betur at vera í búrinum.

Vanærdur tagdi eg, og kendi meg sum so oftani, táið eg tosi við mína snøggu, vøkru, klóku og villu vinkonu – eg kendi meg ógvuliga tápuligan.

Hevur tú ikki lagt til merkis eitthvørt merkisvert hjá pelikanunum og kondorunum? spurdi hon síðani. Jú, varð svarað, eg havi sæð teir breitt hesar øgiligu veingirnar út og lamma seg við teimum, havi sæð teir sýnt sín stórleika og teirra fúrstaliga skreyt og skrúð.

Og hevur tú, spurdi vinkonan, snjóuglan, hevur tú eisini sæð teir á flogi? Nei, svaraði eg, teir fara ikki á flog.

Hví man tað vera, tápulingur mín? Spurdi snjóuglan. Hví heldur tú, at teir ikki gera annað enn at lamma seg við slíkum øgiligum veingjapryði og hví stríðast teir við at vísa sín majestetiska vakurleika, táið teir ikki fara á flog allíkavæl: Teir eru skerdir, veingjafjarðarnar eru kutaðar av teimum.

Tí taki eg tað framum at vera verandi í búrinum.

Stikaða frælsið merkir: Ongar rimar, men skerdar veingjafjarðar. Búrið merkir: rimar, men óskerdar veingjafjarðar.

Ongin okkara sleppur á flog í hvussu er.

**NB:** Nobelvinnarin í føgrum bókmentum, Heinrich Bøll, skrivaða hetta lítla essay´ið í 1964. Týddi hetta, tí eg helt substansin vera ógvuliga átøkan okkara egnu støðu í heimssamfelagnum.

# Vit skulu skapa skilagóðar fortreytir fyri fiskivinuna



Val X

BÁRÐUR POULSEN
Valevni Fólkafloksins

Eitt av hjartamálinum hjá mær næstu fýra árini er høvuðsvinna okkara.

Føroyar hava gjøgnum tíðina flutt seg frá bóndasamfelagnum til fiskuvinnusamfelagið, tvs. frá einum samfelag, har tú varð illa fyri, átti tú ikki jørð, og til eitt samfelag, sum enn er stoltleiki føroyinga.

Vit eru í dag í ferð við at flyta okkum frá fiskivinnusamfelanum til vitanarsamfelagið. Men hvat fer hetta at týða fyri okkum?

Mín greiði hugburður er, at vit altið skulu finna nýggjar vinnur, soleiðis at vit frameftir fáa fleiri bein at standa á.

Men so leingi vit enn í stóran mun bert hava fiskivinnuna at stuðla okkum til, so mugu og skullu vit skapa so góðar karmar fyri fiskivinnuni sum til ber. Eitt nú skulu okkara sjómenn framvegis fáa tann sjómannafrádrott, sum teir nú fáa, og harumframt mugu og skullu vit fjølga um tey fólk, sum arbeiða á okkara flakavirkjum.

Skip og virkir mugu og skulu fáa so góðar karmar sum til ber. Her hugsi eg eisini um fiskiveiðurættindi, og um at fáa so góðar avtalur sum til ber við onnur lond, eitt nú innan tollfrælsi fyri okkara fiskavørur. Fólkaflokkurin er vinnulívsflokkurin fram um aðrar. Fái eg álit frá tær vil eg arbeiða fyri hesum.

# Nýggjársheilsan: Vit liva ikki av partabrøvum eina



Val X

JOHN JOHANNESSEN
www.john.fo

**2007 var eitt gott ár og útlitini fyri 2008 eru somuleiðis góð. Men latum okkum saman minnast til, at politikkur ikki bert snýr seg um at fylgja ráðunum frá teimum máttmiklu og ríku. Politikkur snýr seg um at skapa vælferð fyri einstaka menniskjað í felagsskapinum**

Vit kundu gamlaárskvøld taka saman um og fegnast um eitt gott ár við búskaparligum framburði og øktari vælferð. Vit kundu fegnast um, at tað gongur væl í Føroyum, og at útlitini fyri 2008 eru góð.

Tað gongur við rúkandi ferð í føroyska samfelagnum. Men samstundis sum arbeiði er til allar hendur, kann búskaparligi framburðurin kortini lættliga breiðka munandi um gjónna ímillum tey ríkastu og tey, ið ikki megna at fylgja við. Skyldan hjá okkum politikarum er at syrgja fyri, at byrgt verður upp fyri hesum.

**Øll skulu við**

Tað er gott, at tað gongur væl í Føroyum. Men meðan politikarar og nýríka yvirstættin fegnast um partabrævasølur og høgar kursir, skulu vanligu føroyingarnir við eini starvsmannaløn uppá góðar 20 túsund krónur í part, rinda 3 milliónir fyri ein bústað, um tey eins og flest onnur ynskja at seta búgv í miðstaðarøkinum saman við báðum børnum teirra.

Umframt hetta er neyðugt at rinda fleiri túsund krónur um mánaðin fyri barnaansing, sum fortreyt fyri at sleppa út á arbeiðsmarknaðin. Síðani eru tað túsundkrónuseðlarnir til millum annað mat, klæði og obligatoriska bilin, ið skal fáa logistikkin at hanga saman.

Her er lítið pláss at hugna sær við partabrævakursum, prospektum sum góða nátt lesnaði og at dansa við í privatiseringsdansinum. Tí privata roknistykkið gevur undirskot. Hesir "vanligu" føroyingarnir sleppa ikki at eta fínar døgurðar saman við nýríku yvirstættini.

Harumframt ger økta arbeiðsbyrðan hjá teimum flestu tað trupult at fáa sameinað familju- og arbeiðslív. Og tískil liva fólk støðugt við ringari samvitsku antin móti familjuni ella arbeiðsplássinum.

Soleiðis er støðan hjá vanligu familjuni. Hvaðna verri er hon hjá einsamalla uppihaldaranum.

**Tippa gjónna**

Tá eg brúki so nógva orku uppá hesi viðurskiftini í hesi nýggjársheilsanini, er tað fyri at vísa á, hvørjar politiskar avbjóðingar, ið liggja fyri framman eftir valið 19. januar.

Tað er gott, at tað gongur væl í Føroyum. Men tað er okkara skylda sum politikarar at syrgja fyri, at tað gongur væl hjá øllum í Føroyum. Serliga er hetta ein skylda, ið áliggur okkum, ið eru partur av Javnaðarflokkinum og harvið sosialdemokratisku hugsjónini, ið byggir á Frælsi, Javnstøðu og Samhaldsfesti.

Ein keta er ikki sterkari enn veikasti liðurin. Soleiðis er eisini við einum samfelag. Ikki fyrr enn tey veikastu hava tað gott, hava vit nátt Tí góða samfelagnum. Uppskriftin verður so væl útgreinað í rakstrarrópinum hjá felagsskapinum Javna, tá tey siga: "Í einum samfelag, har tey veikastu hava tað gott, hava øll tað gott!"

Latum okkum saman minnast til, at politikkur ikki bert snýr seg um at fylgja ráðunum frá teimum máttmiklu og ríku. Politikkur snýr seg um at skapa vælferð fyri einstaka menniskjað.

Fari til endans við orðum frá Peturi Mohr Dam, sála, at minna okkum øll á, at aftan fyri framgongdina hjá einum og hvørjum samfelag liggur stríðið hjá arbeiðandi fjøldini. Vit liva ikki av partabrøvum og privatiseringum eina.

*Hann baksast má for*
*breyðið sítt*
*og balast hart og stríða*
*tann arbeiðsmaður, ofta títt*
*í armóð, neyð má líða.*
*Hann fosturlandi fagnað*
*ber.*
*Teir frægu tó ei fata,*
*at uttan hansar hollu gerð*
*teir ongan munnin mata.*